# Tórshavnar kommuna letur »grøna virðisløn«



*Umhvørvislønin er 10.000 krónur og verður handað á umhvørvisvikuni 4. 9. mai*

Tá Umhvørvisvikan 2009 verður í mai mánaði, verður ein nýggj umhvørvisvirðisløn fyri fyrstu ferð latin einum stovni, virki, felag, bólki ella einstaklingi í Tórshavnar kommunu, sum hevur gjørt nakað serligt fyri umhvørvið.

Umhvørvisvirðislønin er áljóðandi 10.000 krónur, og fram til 17. apríl ber til hjá øllum at innstilla onkran til virðislønina, og tá Umhvørvisvikan verður frá 4. til 9. mai, verður virðislønin handað.

Hugsanin er, at fólk skulu innstilla onkran, tey halda hava uppiborið eitt herðaklapp fyri okkurt gott umhvørvisarbeiði ella -átak, og eisini ber til at innstilla seg sjálvan til virðislønina.

Nógvar orsøkir kunnu vera til eina innstilling, so sum orkusparandi tiltøk, varandi orka, skiljing av burturkasti, endurnýtsla, kunning um umhvørvisvernd, dálkingarfyribyrgjandi átøk, vistfrøðilig átøk, umhvørvisvinralig ferðsla og mangt annað.

Bert hugflogið setur markið, tí øll eru vælkomin at venda sær til Tórshavnar kommunu við innstillingum til Umhvørvisvirðislønina, tí jú fleiri eru at velja ímillum, jú betur er.

Oyðublað til innstillingina kann takast niður á www.torshavn.fo ella fáast í Snarskivuni, telefon 302010. Innstillingarnar skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 17. apríl 2009.

## Musikkandakt í Hoyvíkar kirkju

Mánakvøldið 30. mars klokkan 20.30 - 21 verður musikkandakt í Hoyvíkar kirkju. Hetta er ein friðarligur hálvur tími, har fólk eftir arbeiðstíð kunnu savnast til andakt. Strúkiorkestur Tórshavnar musikkskúla spælir, og Theodor Olsen, prestur hevur andaktina.

## Føroya besti nýggi bólkur á Norðuratlants Bryggjuni

**Dupultkonsert við tveimum av Føroya mest spennandi bólkum verður á Norðuratlantsbryggjuni í morgin, leygardagin, klokkan 21.00**

Moby and the Pink Pilot spæla framsóknan føroyskan garagurokk við einum dukandi hjarta fullum av sterkum meiningum og góðum tónum. Á pallinum rokkar trioin við teirra tungu melodisku riffum og erligu tekstum. Tá Planet Awards varð hildið, bleiv bólkurin skírdur ársins besti nýggi bólkur í Føroyum. Hetta av góðum orsøkum.

Men áðrenn Moby and the Pink Pilot vera sleptir leysir á palli, koma nýsprotnu Lady Fire. Fýra góðir vinir mannaðu bólkin í samband við altjóða Global Battle of the Bands (GBOB) 2008 fyri at taka lut í kappingini um at vinna 100.000 dollarar og world wide promotion.

Lady Fire spældu seg trygt víðari frá Føroyum í altjóða finaluna í London, har teir fingu eitt flot 5. pláss út av 26 bólkum úr øllum heiminum. Síðan tá hava Lady Fire spælt kring alt landið og spæla millum annað eisini á G! Festivalinum í summar. Leygarkvøldið spælir bólkurin tó í Keypmannahavn!

Norðuratlants Bryggjan er á Strandgade 91 í Christianhavn

Atgongumerki kunna keypast á wwwpolitikenbillet.dk/nordatlanten ella á bryggen@bryggen.dk.

Prísur: 110 kr. á forsølu, 150 kr. við hurðina.

Lesandi: 80 kr. við at vísa lestrarkort.

## Vípan nýggjur búfuglur í Føroyum



Vípa er nýggjur búfuglur hjá okkum. Bæði veðurlagsbroytingar og tað, at stór øki verða velt upp úr nýggjum, hevur gjørt tað møguligt hjá vípuna at eiga her.

Náttúrugripasavnið skrivar, at vípa hevur reiðrast í eina trý ár á Velbastað, og er hon komin aftur á búplássið aftur í ár. Eisini hevur hon reiðrast í fleiri ár í Sandoynni, bæði í Søltuvík og við norðurendan á Sandsvatni. Hon heldur til í góðum mýrilendi og í vátum bø.

Vípa er sera eyðkend av toppinum á nakkanum. Og tað er sera várligt at hoyra vípuna láta og síggja hennara vakra leik í lofti.

Vípa hevur vetrarvist í Vesturevropa, og regluliga síggjast minni flokkar av vípum um nýggjarstíð. Hetta eru helst nakrar av teimum, ið annars halda til á sumri í skotsku oyggjunum. Men tær hvørva aftur, áðrenn tær venda aftur á búplássini í marsmánaði nøkulunda samstundis, sum tjøldrini venda aftur á grækarismessu.

## Fornminnisfelagið í Nes Kommunu havt aðalfund

Aðalfundurin í Fornminnisfelagnum í Nes Kommunu varð hildin leygardagin 28. februar 2009. Nevndin hevur nú skipað seg, og í nevndini sita hesi fólk: Regin Debess, formaður, Petur Thomsen, næstformaður, Josefina Jacobsen, kassameistari, Mejnhardt Hansen og Dagfinnur Højgaard; og sum eykalimir: Kaj Højgaard og Judith Johannessen.

Avgjørt var á aðalfundinum, at sama nevnd eisini skuldi vera nevnd í Bygdasavninum í Nes Kommunu.

Av málum, nevndin arbeiðir við, kunnu nevnast: Gamla Gerði verður sett í upprunastand innan og uttan, Gaddhúsini eru um at vera liðugt umvæld, Prestaneystið á Neshamri skal hava eina stóra umvæling, har tekja og skjøldrar verða skift. Harumframt arbeiðir dagligi leiðarin, Karin Kastalag við framsýningini í Gamla Prestagarði á Nesi. Har verður gjørt klárt at taka móti vitjandi og ferðafólki aftur í summar.

Sosialurin